FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. apríl 2024
J.nr.: 24/09869
Viðgjørt: TM

Svar til § 52a fyrispurning nr. 52-115/2023 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um fíggjarligar avleiðingar av kongsvitjan.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er metta samlaða nýtslan hjá landskassanum í samband við kongsvitjanina í summar, heruppií eisini innanhýsis umraðfestingar og arbeiðsorka, sum annars hevði verið brúkt til annað?

Svar til nr. 1
Siðvenja er ikki at meta um samlaðu nýtsluna í sambandi við almennar vitjanir ella tá ið stjórnarráðini eru vertir fyri vitjanum yvirhøvur. Ein partur av vanliga arbeiðsøkinum hjá stjórnarráðunum og almennum stovnum er at taka sær av og vera vertir í sambandi við ymiskar almennar vitjanir.

Biðið er um eykajáttan til beinleiðis eykakostnaðin hjá landskassanum, sum vanlig játtan ikki røkkur til.

Tinganes, 29. apríl 2024

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum